# anarpávar í Wien



*Kristina Háfoss, mentamálaráðharri, Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík og Helgi Fossádal, stjóri á Listasavni Føroya*

*Mynd: Dávur Winther*



*Ein stórur maður gekk runt í framsýningarhølinum ílatin sum ein yvirvaksin ludni - her sæst hann saman við Steinbjørn Jacobsen og Edward Fuglø*



*Øll framsýningin stendur í ljósinum av "Culture Club", sum Edward Fuglø hevur málað*

*Mynd: Dávur Winther*

## Borgarstjórin í Klaksvík errin

Sjálvandi kundi borgarstjórin í Klaksvík ikki annað enn vera errin av, at ein av ”hansara borgarum”, Edward Fuglø varð settur so til háborðs vegna myndina - Culture Club, sum Klaksvíkar býráðið eigur.

Sum um tað ikki var nóg mikið inni, so var allur galvurin á Leopold Savninum – nærri 20 m høgur, skrýddur við ”mentanarpávunum” hjá Edwardi - Her sett upp í vakrari lasermynd, sum lýsti eitt stórt øki væl upp í myrkrinum, har hópin av lesandi ungdómi savnast.

## Eitt roysni at fingið framsíningina í lag

Tað er eitt satt roysni at vera sloppin upp í ”tað betra slagið” hjá øllum, sum við vóru úr Føroyum við verkum sínum: Eward Fuglø; Annie Heinesen, Zacharias Heinesen, Beinta av Reyni, Ingi Joensen; Sámal J. Mikines, Ruth Smith, Hans Hansen – bert fyri at nevna nøkur, sum vóru við til at gera Føroyar og føroyska list kenda og virda úti í heimi.

Sí meira: www.leopold-museum.org






*Myndin hjá Edward Fuglø var eisini lýst upp á veggin á Leopold savninum uttandura*

*Mynd: Dávur Winther*




*Tony Polster, sum var liðskipari hjá Eysturríki í minniliga dystinum í Landskrona í 1990, tá Føroyar "bankaði" Eysturríki, Hann greiddi eitt eitt sindur lotur frá viðferðini, teir fingu frá føroyingur - og brot úr dystinum vórðu víst á stórskíggja*

*Mynd: Dávur Winther*